



*Nærmasta familjan hjá Svend Auken. Í miðjuni sæst elsti sonurin, David Auken. Til høgru sæst einkjan, Anne Wivel*



*So var seinasta reyða flaggið pakkað saman og tíð at lata sosialdemokratiska stríðsmannin hvíla í friði*

Thorning Schmidt tosar um Svend og framtíðina, sum hann ongantíð stúrdi fyri. Um hvussu hon hevur varnast, at Svend Auken hevði eitt serligt pláss í hjørtunum hjá teimum ungu, tí saman við honum kundu tey droyma. "Nú er tað upp til okkum at bera dreymarnar hjá Svend víðari", ljóða inniligu orðini úr hátalaranum.

Løtan er komin at enda. Og meðan yndissálmurin hjá Auken "Morgenstund har guld i mund" ljómar yvir torgið, rassast politistarnir við. Gera seg til reiðar at fáa fólkini at flyta seg, nú kirkjudyrnar fara upp og eitt langt fylgi av fólkatingslimum, politikarum, familju og vinum koma oman gjøgnum trappurnar fram við reyðu fløggunum. Men fína fylgið fær frið fyri mannamúgvuni, sum longu er farin at spjaðast út aftur í býin. Í staðin halda politistarnir seg nú framat ruðuleikanum av journalistum og myndatólunum, sum tyrpast um fylgið á kirkjutrappuni.

Og tey eru øll har, konan og børnini hjá Svend Auken, gamli Anker Jørgensen, samankropin og við stavi, Poul Nyrup Rasmussen, Ritt Bjerregaard, og øll hini, sum spældu ein týðandi lut í lívinum hjá farna sosialdemokratinum - og øvugt.

Og øll sleppa tey at minnast hann frammanfyri snurrandi upptøkutólunum við vøkrum orðum, sum fara at fylla sjónvarpstíðindini um kvøldið, áðrenn tey fara víðari ein fyri og annar eftir til torgið er tómt.

Bara uppi á trappuni hómast ein einsamallur eldri maður í slitum bláum frakka, sum baksast við at pakka sítt reyða flagg og stongina niður í eitt langt hylki úr svørtum plastikki.


Sosialurin
Ítróttur
Tiltøk
Nøvn
Skráir

Keypssamtøkan í Miðbýnum

FK í Miðbýnum sóknast eftir

**Handilslærlingi**



**at byrja 14. september**
**ella eftir nærri avtalu**

**Krøv um útbúgving**

· FHS - 3 ára lærutíð
· HH - 2 ára lærutíð
· Student ella HF - 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða einum drongi ella einari gentu, við dirvi og áræði, eina útbúgving undir skipaðum viðurskiftum, í einum handli, sum lív er í

**Arbeiðstíð:** 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark

**Okkara krøv:** Tú skalt vera fyrikomandi, kundavinarlig/ur, røkin, hava góð samstarvsevni

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja til 311320 ella 228222 og spyrja eftir Boga Vík

**Umsókn:** Skrivlig umsókn, merkt *Lærlingur,* skal í seinasta lagi sunnudagin 23. august 2009, saman við próvtøkuskjali sendast til

**FK í Miðbýnum**
**Att. Bogi Vík**
**Dr. Jakobsensgøtu**
**Postboks 349**
**FO-110 Tórshavn**

fk

ella sum teldupostur til: bv@fk.fo



**Frensur burturblivin**

Um nakar veit um hendan 2 ára gamla frens í bleiv burtur 3/8 í Kaldbak men kann hava ferast við bili, kunnu tit ringja á tlf 255881

**BALLUPRESSUR**

FÁIÐ SLÁTTURIN SKJÓTT
OG VÆL FRÁ HONDINI




- Betri fóður
- Skjótari líðugt
- Lætt at handfara

Triv

Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

**SLÁIMASKINUR**

IÐ SLÁA ALT

- 2+2 gear ella 6+2 gear (báðar vegir)
- Prísir frá kr. 16.350 til 31.000




Triv

Heygsvegur 30 · FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 69 10 · Fax 31 69 10
T-postur: triv@post.olivant.fo

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar